## Balazs um lívið í Leirvík

Í USA eru tað nógvir tónleikarar, sum leita eftir eydnuni og royna at fanga alabogan, men í teirra stremban, missa tey seg sjálvi burtur. Monika hevur valt eitt stilt lív her í Lorvík, men tað er ikki nakað fátækt lív. Hon hevur eina fantastiska familju og eitt fantastiskt umhvørvið. Hon øvar á violinini, samstundis sum hon ger døgurða, koyrir ørindi, vitjar vinfólk, hjálpir børnunum, fer til arbeiðis, og alt hitt sum hon far frá hondini hvønn dag. Lorvík hevur gjørt hana til ein enn betri violinist, tí hon hevur eitt heilt lív og er ein heilur persónur, heldur Frederic Balazs.



## Hann spældi fyri Hannu

Tá Balazs var í Føroyum seinast var hann so hugtikin av einari eldri konu, sum hann kom at kenna. Monika visti av hesum, og onkuntíð tá hon hevur sent honum brøv, hevur hon lagt eina lítla bók við og skriva , at hon var frá Hannu. Í dag er Hanna heilt í ørviti, og Balazs hevur ikki spælt violin í meira enn eitt ár. Men tá hann og Monika fóru at vitja Hannu, helt Monika fyri, at hann var noyddur at spæla fyri henni. Á ellisheiminum tók hann violinina fram, stillaði seg við síðuna av Hannu og spældi eitt vakurt lag. Hon sat og ruggaði í takt, og ikki eitt eyga var turt, sigur Monika.



*ein perla. Hóast tit eru partur av heiminum, so eru tit heilt øðrvísi, og tað er akandi, sigur 87 ára gamli amerikanski komponisturin, Frederic Balazs. Hann na stóra altjóða karrieru, og í hesum døgum er hann og vitjar vinfólk í Lorvík ristian Vang*



*Frederic Balazs hevur glett seg at heilsa uppá 9 ára gomlu Deboru, sum var við til allar konsertirnar fyri nígggju árum síðani, men sum ikki kom til verðina, fyrr enn hann var farin avstað aftur*

lurtaðu við dyrnar á einari stovu, har fólk, sum høvdu søkt starv í stórum orkestri, vóru til samrøðu. Knappliga letur vinnmaðurin hurðina upp og skumpar meg inn. Men í staðin fyri at fara í panikk, valdi eg bara at lata sum um, at eg veruliga ætlaði mær starv. Eg veit ikki, hvat dómsnevndin helt um henda spinkla, unga drongin í stuttum buksum, men eg fekk starv, greiðir Frederic Balazs stillisliga frá.

At hann slapp til USA í 1940 var eisini eitt sindur av tilvild. Men sum ein rættur amerikanari er hann ein ambitiøsur maður, og í USA hevur hann arbeitt sum violinistur, stjórna stórum orkestrum og skriva tónleik.

- Eg vildi hava navn mítt í neon, sigur Frederic Balazs og finnur eina mynd fram, har eitt neonskilti á einum konserthúsum sigur, at í kvøld verða spæld stykki eftir Mahler og Balazs

- Men eg skilji ikki, hví teir skulu seta hitt navnið framman fyri mítt, sigur hann og hyggur strangur upp á Moniku.

- Eg meini so við, hvør kennir Mahler, sigur hann við einum speiskum smíli.

ric Balazs er at geva fólki, sum lítið og onki kennir til klassiskan tónleik, nýggjar tónleikarligar upplivingar og innlit. Hann var í mong ár leiðari fyri ein stovn, sum skipar fyri klassiskum konsertum á barnaskúlum, men tað er ikki bara millum børn, at Frederic Balazs hevur verið við til at flyta mørk.

- Eg eri útnevndur indianarahøvdingi millum Kiowa indinarar. Har eiti eg Chief Fire Music Maker. Tað var tí, at eg einaferð fór at vitja ein hundrað ára gamlan indianarahøvding. Eg spældi violin fyri honum, og hann var púra burtur í tónleikinum. Hann hevði ongantíð hoyrt livandi violintónleik fyrr.

- Eina aðru ferð fekk eg høvi at vitja ein sokallaðan heilagan fólkabólk á hálendinum í Nýguinea. Tey vóru innsmurd í runu, og tá eg tók violinina fram, fóru tey øll upp at ýla. Eg helt, eg var komin til mína síðstu løtu. Men so fekk leiðarin tey at tiga, og tey sótu pinnastill, meðan eg spældi. Tá eg varð liðugur, fóru tey aftur upp at ýla, men hesuferð var tað í fagnaði av tónleikinum, greiðir Frederic Balazs frá.

verið í Leirvík, og mánadagin hevði Monika Stauss Joensen skipað fyri einum hugnakvøldi fyri innbodnum í Bátasavninum. Hon og Ólavur Jakobsen spældu løg á guitara og violin, og tey greiddu frá um Balazs og konsertferð teirra í USA.

Ólavur greiddi frá, hvussu væl Frederic Balazs dugdi at fáast við bæði høg og lág. Um tað vóru rík fólk í Los Angeles ella børn í einum lítlum bygdaskúla, so var hann tann sami og líka væl dámdur av øllum. Og sum hesin eldri amerikanarin gekk millum seksmannafórini og prátaði við Leirvíkingar og onnur, livdi hann onkursvegna upp til orðini hjá Ólavi.

- Vinabond hava onki við støð ella materiell ting at gera. At Monika býr í Leirvík og eg í USA er bara tilvild, men okkara vinaband er nakað andaligt og ævigt. Og tónleikur er sum vinabond, hann er tann sami allastaðni, staðfesti Frederic Balazs.

### New Frontiers

Eitt av hjartamálunum hjá Frede-

### A Place Called Leirvík

Hesa vikuna hevur Frederic Balazs